# Fleiri velja miðnámsskúlar

**Umsóknirnar til miðnámsskúlarnar kring landið eru fleiri í tali í ár enn undanfarin ár. Tað er ilt at siga, hví talið er hækkað, men Sámal í Skorini, rektari á Studenta – og HF-skeiðnum á Kambsdali, sigur, at føroyska búskapargongdin helst fær tey ungu at velja miðnámsskúlar heldur enn vinnuna**

ÙTBÚGVING
*Hans Kárason Mikkelsen*
*mikkels@fas.harvard.edu*



Tað eru meira enn hundrað fleiri umsóknir til føroysku miðnámsskúlarnar í ár, enn tað var fyri einum árið síðani. Í fjør var talið 931, men nú í ár er talið hækkað til 1061 umsøkjarar. Talan er um eitt ordiligt lop, tí undanfarin ár er umsøkjaratalið vaksið ógvuliga spakuligt, ikki við meira enn 20 næmingum hvørt árið, og onkuntíð er talið minkað.

– Talið hevur ikki hækkað spakuliga. Síðani 1996 hevur talið gingið stútt niðureftir, men í fjør sóu vit fyri fyrstu ferð í nøkur ár eina lítla hækking í umsøkjaratalinum. Men í ár er vøksturin nógv størri enn undanfarna árið, einir fýra til fimm nýggir flokkar, sigur Sámal í Skorini, rektari.

Spurdur hvat orsøkin mann vera til nógvu umsøkjararnar, sigur Sámal í Skorini, at talan er sjálvandi um tann niðurgangandi konjunkturin í samfelagnum. Men Sámal í Skorini sigur eisini, at marknaðarføringin av skúlunum er vorðin nógv betri seinnu árini.

*Vit duga betri at selja okkum enn fyrr, sigur Sámal í Skorini, rektari á Studenta – og HF-skeiðnum á Kambsdali*

– Vit duga betri enn selja okkum enn fyrr. Seinastu tvey árini hava vit til dømis havt útvarpslýsingar fyri at tekkjast næmingum. Og í ár hava vit bjóðað øllum framhaldsdeildunum inn á skúlan í Kambsdali, har tey hava møguleika fyri at kunna seg um viðurskiftini. Tann týdningarmesti parturin er helst, at tey sleppa at møta núverandi næmingum og síggja, hvussu stuttligt og áhugavert tað er at ganga her, sigur Sámal í Skorini um Studenta – og HF-skeiðið á Kambsdali.

Skúlin á Kambsdali hevur í ár væl fleiri umsøkjarar enn undanfarin ár, og talan verður helst um ein flokk afturat.

– Men tað er ein spurningur um pengar. Ein flokkur hjá okkum kostar umleið kr. 600.000 um árið, so har skal ein játtin til, sigur rektarin.

Umsøkjaratalið til miðnámsskúlarnar er tilsamans vaksið við einum fýra til fimm flokkum, og hetta merkir, at Løgtingið má játta meira pening, um hesi skulu ganga í skúla.

– Talan verður helst um hálva aðru milliónina hetta árið, og so meira seinna, sigur Sámal í Skorini.

Landsstýrismaðurin í skúlamálum, Jógvan á Lakjuni, er burturstaddur, og tað bar ikki til hjá Sosialinum at fáa viðmerkingar til, at meira pengar skulu játtast til miðnámsskúlarnar.

# Klaksvík fær nýggja farmaleið

**Fríggjakvøldið 2. apríl fer íslendska farmaskipið "Skaftafelli" sín fyrsta túr úr Klaksvík til Immingham í Onglandi. Tað eru Farmaleiðir hjá Strandfaraskipum Landsins og íslendska flutningsfyritøkan Samskip, sum hava gjørt samstarvsavtalu um nýggju farmaleiðina**

*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*



*Hinrik Ö. Bjarnason, deildarstjóri í Samskip*

Hósdagin hevði íslendska flutningsfyritøkan Samskip móttøku í Skálanum í Klaksvík, í sambandi við at fyritøkan longu fríggjakvøldi byrjar at flyta fiskavørur úr Klaksvík beinleiðis til Immingham og víðari til Belgia og Noreg.

Nógv vinnulívsfólk, bæði úr Klaksvík og aðrastaðni, vóru komin at kunna seg um nýggju møguleikarnar, íslendska farmaleiðin hevur at bjóða.

## Farmaleiðir og Samskip.

1. mars í ár undirskrivaðu Farmaleiðir og Samskip avtalu um beinleiðis flutning av frystum og saltfiskavørum millum Klaksvík og Immingham. Tað var íslendska fyritøkan sum fyrr í ár vendi sær til Farmaleiðir við fyrispurningi um samstarv.

– Okkara leikulutur verður at samskipa flutningin frá øðrum bygdum til Klaksvíkar umframt at taka okkum av skipaavgreiðsluni fyri Samskip í Klaksvík. Har hava vit avgreiðslu frammanundan og nýtast tí ikki at leggja nýggja orku í tann partin. Vit hava longu eitt landsumfatandi flutningsnet, sum vit allatíðina royna at menna, so átakið hjá Samskip var ein kærkomin møguleiki hjá okkum at stimbra okkara tænastur kring landið, sigur Heini á Borg, stjóri á Farmaleiðum.

## JFK nýggjan møguleika.

Hanus Hansen, stjóri á JFK, er eisini sera spentur uppá nýggja flutningsmøguleikan.

– Sum er brúkar JFK flutningstænastuna hjá Skipafelagnum og Eimskip. Báðar fyritøkurnar veita ein góða tænastu, men tað hevur allatíðina verið ein vansi fyri fiskaflutningin hjá okkum, at hvørgin teirra siglir beinleiðis til Ongland, sigur Hanus.

– Tað er ongin loyna, at okkara bingjur eru til ampa fyri fólk og ferðslu her norðuri. Tær, sum skulu flytast við Eimskip, skulu fyrst til Lorvíkar og síðani víðari til Havnar. Bingjubilarnir fylla nógv umborð á Dúgvuni og Sam og mugu ofta bíða til pláss er fyri teimum. Skipini hjá Skipafelagnum sigla úr Klaksvík, men tey leggja leiðina fram við Rotterdam, áðrenn farið verður víðari til Ongland, og tí tekur tað 1 viku, áðrenn okkara fiskavørur eru í Immingham ella har um leiðir. Við Skaftafelli tekur tað ikki 2 døgn, og tað er sjálvandi ein stórur fyrimunur, sigur Hanus Hansen

## Upplagdur møguleiki.

– Sum altjóða flutningsfyritøka halda vit alla tíðina eygu og oyru opin fyri nýggjum farmaleiðum og tað er ikki av tilvild, at vit hesuferð hava valt at bjóða okkara tænastu fram í Klaksvík, sigur Hinrik Ö. Bjarnson, deildarstjóri í Samskip.

– Vit hava kunnað okkum um flutningstørvin her um leiðir, og ongin ivi er um, at serliga fiskafyritøkur í bæði Klaksvík, Runavík og Fuglafirði hava tørv á eini beinleiðis flutningsleið til Ongland. Í 2006 verður landafast millum millum Klaksvíkina og meginøkið, nýggja góðshavnin í Klaksvík verður klár at taka í nýtslu um eitt ár, so her er góður gróðrarbotnur fyri eini blómandi flutningsvinnu, vit fegnir vilja eiga okkara lut í, sigur Hinrik Ö. Bjarnason. Íslendska flutningsfyritøkan byrjaði sítt virksemi í 1950 og hevur nú deildir í 15 londum um allan heimin.



*Heini á Borg, stjóri á Farmaleiðum*

ítróttur

Nr. 66 • leygardagur • 3. apríl 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo




# Øll eygu vend móti Hálsi

**Seks dystir standa á skránni seinasta umfarið, men tað tykist bara vera tann eini, sum fólk tosa um. Gullbrakið á Hálsi**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Kyndil-VÍF í manshondbólti. Tað tykist vera tað, sum alt snýr seg um seinasta umfarið, tó at seks aðrir dystir eisini eru á skránni*

Seinasta umfarið í hondbóltskappingini stendur á skránni, og fyri spenningin kundi kappingin ikki lagað seg betri. Ein »Winner takes it all« dystur millum risarnar í føroyskum manshondbólti, har meistaraheitið verður avgjørt á seinasta leikdegi. Meira spennandi enn tað sama verður tað neyvan, og tí kann við gleði staðfestast, at HSF enn einaferð hevur havt eina hepna hond við tilrættisleggingini av landskappingini.

Einki er at ivast í, at talan verður um ein stúgvandi fulla høll, sum fer at gera sítt til, at karmarnir kring stórdystin verða í topp, og sum tað framgongur á næstu síðunum, so eru tað ikki bara áskoðararnir, sum bíða í spenningi.

## Neistin spælir fyri møguleikanum

Men tað verða so eisini fimm aðrir dystir leiktir leygardagin, og fyri tey mest optimistisku Neistafólkini kann ein teirra eisini fáa avgerandi týdning fyri, hvar meistaraheitið mansdeildini endar.

Neistin hevur nevnliga enn ein teoretiskan møguleika at taka gullið. Hetta um teir vinna við í minsta lagi 22 málum meira enn VÍF – um teir vinna – vinnur á Kyndli.

Og sum skilst, so ætlar Neistin sær eisini at spæla fyri hesum.

- So leingi vit hava møguleikan, so mugu vit royna, so vit leggja nógv fyri leygardagin. Men tað sigur seg tó sjálvt, at vónirnar kanska ikki eru tær bestu, vóru orðini, sum ein av leikarunum segði eftir venjingina hóskvøldið.

Seinasti dysturin leygardagin verður á Skála, har StÍF tekur móti KÍF. Á pappírinum hevur hesin dysturin lítið annað at siga, enn at KÍF kanska kann lyfta sær av niðasta sessinum, og við spælinum, sum StÍF hevur sýnt seinastu tíðina, so er hetta heldur ikki heilt óhugsandi. Hinvegin vil StÍF helst sleppa at enda kappingarárið á virðiligan hátt, so viðhaldsfólkini hóast alt fáa nakað at klappa at í seinasta dystinum.

## Avgreiðslumál

Hjá kvinnunum varð gullið avgjørt fyri viku síðani, tá Stjørnan vann útidystin á VB, og leygardagin skulu tær so gera seg til reiðar at taka ímóti gullinum.

Tí er einki at ivast í, at talan verður um eina fullsetta KÍ-høll, sum fer at fagna lokalu stjørnunum, og heldur eingin ivi man vera um, at tær eisini vilja vinna hendan seinasta dystin.

Neistin hevur í sínum lagi heldur einki annað enn æruna at spæla fyri, og tí kann talan væl gerast um ein undirhaldandi dyst, har bæði liðini kunnu spæla púrasta frígjørt, og so verður kanska rúm fyri krási av onkrum slag til áskoðararnar.

Á Giljanesi skal VB reisa seg eftir vónbrotið seinasta vikuskiftið, og lítið er at ivast í, at hetta er nakað, sum liðið eigur at megna. Styrkismunurin niður til botnin hevur verið ovurstórur aftur í ár, og VB vil uttan iva eisini enda árið á rættan hátt.

Tað vilja kvinnurnar hjá VÍF helst eisini, tá tær vitja Kyndil í seinasta dystinum, og sum alt hevur lagað seg, so verður helst talan um nakað nógv fleiri áskoðarar, enn dysturin millum júst hesi liðini annars bendir á.

Orsøkin er sjálvandi eftirfylgjandi mansdysturin, og tí er lítið at ivast í, at vestmannakvinnurnar fara at leggja nógv fyri í royndunum at hita fjøldina upp, soleiðis at menninir kunnu fáa eitt flottari heiðursmerki enn bronsuna, sum kvinnurnar fáa handaða eftir dystin.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

1. deild kvinnur

| Dagf. | Kl. | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 03.04 | 14.30 | Kyndil-VÍF | Kristian Johansen & Sámal Hansen |
| 03.04 | 14.30 | Søljan-VB | Jákup S. Simonsen & Høgni M. Joensen |
| 03.04 | 15.00 | Stjørnan-Neistin | Karsten Joensen & Kristian Joensen |

1. deild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| 03.04 | 16.00 | Kyndil-VÍF | Kristian Johansen & Sámal Hansen |
| 03.04 | 16.00 | H71-Neistin | Hannis Wardum & Uni Wardum |
| 03.04 | 16.00 | StÍF-KÍF | Geir Wardum & Gunnar Wardum |

### Fótbóltur

**Kappingin um Løgmanssteypið**

Bólkur 1

| Dagf. | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 03.04 | KÍ-B36 | Eiler Rasmussen |
| 03.04 | FSV-NSÍ | Lassin Isaksen |

Bólkur 2

| | | |
|---|---|---|
| 03.04 | TB-ÍF | Oddmar Andreasen |
| 03.04 | GÍ-B68 | Petur Skarðenni |

Bólkur 3

| | | |
|---|---|---|
| 03.04 | Skála-EB/S | Suni Johansen |
| 03.04 | VB-HB | Niklas á Líðarenda |

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 11 | 10 -0 - 1 | 630 | 458 | 172 | 31 |
| 2 | VB | 11 | 10 -0 - 1 | 656 | 483 | 173 | 28 |
| 3 | VÍF | 11 | 7 -0 - 4 | 612 | 504 | 108 | 23 |
| 4 | Neistin | 11 | 6 -0 - 5 | 594 | 535 | 59 | 20 |
| 5 | StÍF | 12 | 2 -0 -10 | 551 | 678 | -127 | 9 |
| 6 | Søljan | 11 | 3 -0 - 8 | 437 | 563 | -126 | 8 |
| 7 | Kyndil | 11 | 1 -0 -10 | 372 | 631 | -259 | 3 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Kyndil | 9 | 5 -1 - 3 | 564 | 527 | 37 | 20 |
| 2 | VÍF | 9 | 6 -0 - 3 | 541 | 483 | 58 | 18 |
| 3 | Neistin | 9 | 6 -0 - 3 | 540 | 503 | 37 | 18 |
| 4 | StÍF | 9 | 3 -0 - 6 | 492 | 482 | 10 | 13 |
| 5 | H71 | 9 | 3 -1 - 5 | 484 | 548 | -64 | 9 |
| 6 | KÍF | 9 | 3 -0 - 6 | 522 | 600 | -78 | 9 |